## Samband

Ynskir tú at vita meira, ella hevur tú hug at gerast sjálvboðin, hoyra vit fegin frá tær.

**Heilsu- og umsorganartænastuna**
Postboks 32 • FO-110 Tórshavn
tel. 302010 • heilsuhusid@torshavn.fo

ABC FYRI SÁLARLIGA HEILSU
Ver virkin Ver saman Ver hugbundin



August 2024

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo

**UPPLATINGARTÍÐIR**

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt

NÁTTÚRA, FRÍTÍÐ OG MENTAN

# Vilt tú verða sjálvboðin





Kjarnuuppgávan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni er við miðvísari umsorgan, tænastu, heimatænastu, heilsu- og sjúkrarøkt at stuðla borgaran soleiðis, at hann gerst virkin og vakin alt lívið.

Heilsurøkt og umsorgan er eitt týdningarmikið málsøki hjá Tórshavnar kommunu, sum vil ganga á odda og veita skjóta og góða heildartænastu.

NÁTTÚRA, FRÍTÍÐ OG MENTAN

# Vilt tú verða sjálvboðin

**Heilsu- og umsorganartænastan í Tórshavnar Kommunu leggur dent á, at eldri borgarar trívast, eru virknir í gerandisdegnum og luttaka í tí felagsskapi, sum gevur meining fyri tann einstaka.**

Fleiri eldri borgarar eru nógv einsamøll og ynskja sær tí vitjan og onkran at práta við, at sleppa út at spáka ein túr, ella eitthvørt annað sum tey hava hug til.

## At vera sjálvboðin

At vera sjálvboðin í Heilsu- og umsorganartænastuni kann vera so nógv, tað er bara hugflogi sum setur mørkini. Til dømis kann ein vera vitjanarvinur, gonguvinur, rørsluvinur, ella bara vinur. Um tú hevur hugskot og ynski um at gera okkurt sjálvboðið á eldraøkinum, so vilja vit fegin frætta frá tær.

Kanningar vísa at tey sum eru hugbundin í sjálvbodnum arbeiði, hava tvífaldan møguleika at fyri góðari sálarligari heilsu. Sjálvboðin eru meira nøgd við lívið, saman-borið við tey í ikki gera sjálvboðið arbeiði. Tíðin og orkan tú leggur í sjálvboðið arbeiði kemur tí bæði tær sjálvum og øðrum til gagns. Sum sjálvboðin fært tú møguleika at knýta nýggj sambond, tú lærir nakað nýtt og tú gert gott fyri onnur. Alt nakað sum hevur góða ávirkan á sálarligu heilsuna.

Heilsu- og umsorganartænastan samstarvar við Fólkaheilsuráðið um verkætlanian ABC fyri sálarliga heilsu, sum hevur sum endamál at skapa betri trivna og sálarliga heilsu.

Eisini hevur Heilsu- og umsorganartænastan tætt samstarv við Vitjanartænastuna hjá Reyðakrossi. Áleið 30 vitjanarvinir frá Reyðakrossi vitja javnan eldri borgarar sum búgva á eldrabústovni ella í egnum heimi. Sostatt ber til at vera vitjunarvinur hjá Reyðakrossi og samstundis vera sjálvboðin í Heilsu- og umsorganartænastuni.

## Væntanir

sum sjálvboðin vænta vit:

- at tú vísur virðing, gevur nærleika og tryggleika til tann sum tú vitjar/ert saman við
- at tú virðir sjálvsavgerðarrættin hjá borgaranum, og at tað sum tit gera saman, tekur støði í ynskjunum hjá borgaranum sum tú vitjar
- at tú vísur umhugsni, og at tað tú gert saman við borgaranum er væl umhugsað, og at tú ikki útsetir borgaran fyri nakað sum borgarin ikki ynskir ella megnar
- at tú undirskrivar skjal um tagnarskyldu, at tú virðir tagnarskylduna og ikki fortelur øðrum hvønn tú vitjar, hvat tú sært og upplivir í samband við vitjanina
- at tú hevur greiðar avtalur við borgaran sum tú vitjar, og at avtalurnar verða hildnar
- at tú ikki gert arbeiðið sum starvsfólk eru sett at gera
- at tú virðir hugsjónina hjá borgaranum politisk og átrúnaðarliga
- at tú ikki tekur ímóti gávum ella pengum frá borgaranum sum tú vitjar
- at tú ikki er ávirkað/ur av rúsdrekka/evni tá tú virkar sum sjálvboðin
- at tú setur teg í samband við kontaktpersónin um tú hevur ivamál, ella eitthvørt er sum tú ynskir at tosa um

## Væntanir

Sum sjálvboðin í Heilsu- og umsorganartænastuni ert tú ikki tryggjaður, og mæla vit til at tú hevur eina vanlukkutrygging.

Ert tú vitjanarvinur gjøgnum felagsskapin Reyðakross, ert tú tryggjað/-ur.

**TÚ FÆR:**

- góða innleiðslu og ein kontaktpersón
- møguleika at vera sama við øðrum sjálvboðnum
- møguleika at luttaka í undirvísing tvær ferðir um árið um tú ynskir tað